52-085/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 85/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um avgerðirnar um fund við NATO-umboð, viðgerð av hernaðarradara og ábyrgd mótvegis Løgtinginum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hví hevur løgmaður ikki ráðført seg við Uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum, nú hann hevur havt fund við NATO-umboð, meðan mál um hernaðarradara hjá NATO í Føroyum er á skránni?

2. Hví segði løgmaður við fjølmiðlar, at hann fór ikki at viðgera spurningin um hernaðarradara í Føroyum beinleiðis við NATO-aðalskrivaran og onnur NATO-umboð, tá ið hann nú hevði allar møguleikar at gera tað?

3. Var spurningurin um hernaðarradara í Føroyum viðgjørdur á fundum løgmans við NATO-umboð, og um so er, hvat varð sagt og viðgjørt?

4. Hevur løgmaður givið NATO-umboðum ta fatan, at tað eru danskir myndugleikar, ið eiga endaligu avgerðirnar um hernaðarmál í Føroyum?

5. Nær hava Løgtingið og Føroya fólk samtykt, at aðrir myndugleikar, enn teir, ið vit sjálv hava valt í Føroyum, kunnu samráðast um og taka avgerðir um, hvat okkara land skal brúkast til í hernaðarmálum?

6. Kennir løgmaður ábyrgd mótvegis fólkavalda Løgtinginum í viðgerðini av hernaðarmálum, ella heldur hann seg verða lagdan undir danskt vald í hernaðarmálum?

Svar:

Til spurning 1.

Endamálið við vitjanini á høvuðssætinum hjá NATO í Brússel, var at fáa kunning og innlit í trygdar- og verjumál í einum breiðum høpi. Hetta kemst av, at eg vænti, at trygdar- og verjumál fara at fylla meira í føroyskum politikki frameftir, og ein týðandi liður í at fyrireika okkum til framtíðina, er at fáa neyðugu vitanina og innlitið til vega.

Tá ið talan er um vitjanir av slíkum slagi, ið ikki hava til endamáls at taka eina ítøkiliga uttanríkispolitiska avgerð, er ikki vanligt at ráðføra seg við Uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum áðrenn.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Til spurning 2.

Tað gjørdi eg, tí yvirskipaða endamálið við vitjanini og við fundinum við Jens Stoltenberg, aðalskrivara hjá NATO, var at fáa kunning og innlit í trygdar- og verjumál í einum breiðum høpi. Eisini var eg áhugaður í at hoyra nærri, hvørjar avbjóðingar aðalskrivarin hjá NATO heldur verða tær mest átrokandi at loysa komandi árini.

Til spurning 3.

Yvirskipað umrøddu vit trygdarpolitisku viðurskiftini um okkara leiðir. Vit fingu millum annað at vita, hvørjar metingar ymisk NATO-umboð hava um avbjóðingarnar í framtíðini. Eg haldi eisini, at vit fingu undirbygt fatanina av, at okkara geografiska støða í Norðuratlantshavi er týdningarmikil fyri NATO. Ítøkiliga málið um ein møguligan lofteftirlitsradara var ikki á skrá, men bleiv havt á lofti, millum annað í hesum sambandi.

Samanumtikið haldi eg, at vitjanin í NATO hevur styrkt um grundarlagið hjá mær at røkja og verja føroysk áhugamál í trygdar – og verjumálum.

Til spurningar 4, 5 og 6.
Eg gjørdi greitt, at landsstýrið ynskir at fáa størri innlit og ávirkan á okkara trygdar- og verjupolitisku viðurskifti komandi árini, og at avgerðir hesum viðvíkjandi skulu takast í Føroyum.

Eisini nýtti eg høvi til at greiða teimum nærri frá um nýggja samstarvsráðið, sum Danmark, Føroyar og Grønland hava sett á stovn fyri at styrkja samstarvið og samskipanina í uttanríkis-, trygdar- og verjumálum, nú stórveldini vísa áhuga fyri norðuratlantshavi og Arktis.

NATO skipanin er sjálvandi fullgreið um, at trygdar- og verjumál eru felagsmál, sum ríkismyndugleikarnir formliga varða av.

Í Tinganesi, 25. november 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður